STUTT SAGT

# Nú eiga íslendingar at fara eftir trolsaksinum




*Ein av teimum ólógligu trolarunum skipar veiðina umborð á farmaskipið »Polystar«*

*Mynd: Landhelgisgæzla Íslands/Tómas Helgason*

**Íslendska reiðarafelagið mælir sjóverjuni til at kvetta veirarnar hjá trolarunum, sum fiska kongafisk ólógliga í Irmingarhavinum**

FISKISKAPUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tá ein tyrla hjá íslendsku sjóverjuni var úti á Reykjanesrygginum um vikuskiftið, vóru átta útlendskir trolarar har á ólógligari kongafiskaveiði. Teir flestu sjóræningarnir, sum íslendingar rópa hesar trolararnar, eru skrásettir í Georgia og ein í Honduras. Ein av trolarunum var í ferð við at skipa veiðina umborð á farmaskipið "Polystar", sum nú er komið á svartalista hjá NEAFC, tí tað flytir ólógliga veiddan fisk.

Íslendska reiðarafelagið vil hava myndugleikarnar at steðga teimum ólógligu trolarunum alt fyri eitt, sama hvussu tað verður gjørt.

- Annaðhvørt eigur sjóverjan at taka skipini, ella eiga vit at taka tað góða gamla vápnið frá toskastríðnum framaftur og klippa veirarnar hjá teimum tvørturav, sigur Friðrik J. Arngrímsson, forstjóri í reiðarafelagnum, við Fiskifréttir. Hann vísir á, at íslendingar eru í somu støðu sum fyri 30 árum síðani, tá teir fluttu fiskimarkið út á 200 fjórðingar.

Friðrik J. Arngrímsson sigur, at tann óskipaði fiskiskapurin eftir kongafiski á Reykjanesrygginum fer at oyða stovnin. Í mong ár hevur verið roynt at fáa ávirkan á tann ólógliga fiskiskapin við at forða skipunum at fáa nakrar tænastu frá landi, men uttan úrslit, sigur hann.

- Fleiri av skipunum verða útgjørd í ES-londunum, tey kunnu selja fiskin á marknaðinum, og tey hava fingið útgerð og annað í ES-londum, Noregi og í Føroyum, sigur forstjórin í íslendska reiðarafelagnum.

Friðrik J. Arngrímsson vísir á, at sambært altjóða havrættarsáttmálanum er eitt flaggleyst skip ólógligt, og at tað sama er galdandi fyri skip, ið siglir undir flagginum hjá einum landi, sum tað í veruleikanum einki samband hevur við. Hetta seinna er galdandi fyri trolararnar á Reykjanesrygginum, heldur hann og mælir íslendsku myndugleikunum til at lata reglurnar standa sína roynd.

- Tað er í øllum førum eina roynd vert, sigur hann.




*Bakaríið hjá Frants letur aftur fríggjadagin, men letur uppaftur morgunin eftir við nýggjum eigarum. Um eini trý ár ella so kemur ein stórur íbúðar- og handilsbygningur at standa her*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Frá baksturi til góðar íbúðir

**P/f Vørður hjá Justinussen-monnunum hevur nú keypt bakaríið hjá Frants Restorff í miðbýnum í Havn. Bakaríið fer at halda til her eina tíð enn, men í framtíðini er ætlanin at byggja tríatitals íbúðir á hesum staði**

BAKARI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Í meiri enn 100 ár hevur hornið Tórsgøta-Sverrisgøta verið merkt av bakstri frá Frantsi.

Men nú er tað liðugt: Tað gamla, rótfesta navnið Frants Restorff verður frá 1. juli ikki til longur.

Fríggjadagin letur hetta aldargamla bakaríið aftur, men letur upp aftur morgunin eftir við nýggjum eigarum.

Tað nýggja í hesum er, at teir gomlu Frants-kundarnir nú fara til handils hjá Gunnleivi ístaðin. Hetta verður tó bert í eina tíð aftrat.

Herfyri keyptu Heini Restorff og Havgrímur Johannesen nevniliga í felag hesar ognirnar. Teir hava fingið prinsipielt byggiloyvi til at gera ein nýggjan íbúðar- og handilsbygning á staðnum.

- Komandi vár verður helst farið undir hesa ætlanina við íbúðunum. Hon fer væntandi at taka tvey ár at fremja í verki, sigur Heini Restorff við Sosialin.

Millum manna hevur henda ætlanin við íbúðunum verið nógv umrødd.

Fleiri hava borið uppá mál, um tað nú mundi vera neyðugt at byggja so nógvar marglætisíbúðir í høvuðsstaðnum.

Heini vil tó ikki kalla hetta fyri marglætisíbúðir, men heldur góðar íbúðir.

- Vit ætla at tær skulu vera bæði vakrar og prýðiligar, sigur Heini.

Ætlanin er nevniliga at ríva alla ognina niður, og síðani byggja ein bygning í fimm hæddum úr stáli, glasi og aluminium, har íbúðirnar koma at liggja í ovastu hæddini.

Sambært byggisamtyktini skal tænastuvinna og handlar verða í niðastu hæddini, og tí er ikki óhugsandi at onkur handil fer at halda til her í framtíðini.

Enn er ikki avgjørt hvat skal verða í hinum trimum hæddunum. Er onkur skrivstova sum hevur tørv á størri hølum, er ein møguleiki til tað.

- Hinvegin so eru tær eisini væl egnaðar til íbúðir, sigur Heini.

Herfyri bórust tíðindini um hesa ætlanina, tá Dimmalætting skrivaði um hana.

Síðani tá hava bæði Heini og Havgrímur fingið fleiri fyrispurningar frá fólki, sum hava áhuga í at ogna sær eina íbúð miðskeiðis í høvuðsstaðnum.

- Ja, slíkt frættist skjótt. Fleiri hava ringt til mín, millum annað fleiri føroyingar sum búgva í Danmark, sigur Heini.

Íalt fevnir ætlanin um 31 íbúðir.

# Óhapp við motorsúkklu

**Leygardagin hendi eitt álvarsamt motorsúkkluóhapp í Klaksvík . Ungi førarin slapp við lívinum, men fekk álvarsaman skaða**

FERÐSLUÓHAPP

Í góðveðrinum í leygardagin fór ungi maðurin ein túr á nýggju motorsúkklu sínari.

Óhappið hendi, tá hann yvirhálaði ein bil og rendi í reyvina á einum øðrum. Drongurin á motorsúkkluni fór sendandi gjøgnum luftina, og eldur kom í bæði hann og súkkluna.

Ein bilførari, ið kom framvið, hevði eldsløkkjara í bilinum og fekk bast eldinum.

Drongurin slapp við lívinum, men fekk álvarsaman skaða í ryggin og varð sunnudagin fluttur til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

Drongurin hevur tað eftir umstøðunum gott.



*Drongurin á motorsúkkluni slapp við lívinum, men fekk stóran skaða*

## Áheitan frá Ferðslutrygd

**Ferðslutrygd heitir á motorsúkkluførarar um at vera varnar og halda seg frá dárabrøgdum**

Motorsúkklur eru “in”, og tað er spennandi hjá ungum dreingjum at ogna sær eina spildurnýggja skínandi blanka motorsúkklu. Men bert ein lítil feilur kann gera enda á gleðini og elva til stóra vanlukku.

Tí heitir Ferðslutrygd á motorsúkklu førarar um at vera varnar. Teir ungu á motorsúkklu fáa eina serstaka áminning um ikki at taka nøkur óráð fyri.

Eisini er umráðandi at vera í klæðum og hjálmi, sum verja høvd og limir, tá óhapp henda. Og tað er ikki bara gald-andi fyri føraran á motorsúkkluni, men eisini fyri tann, ið situr aftanfyri.

**Ráðið fyri Ferðslutrygd**